Vælkomin í miðdeildina í Gøtu

SKÚLIN Í EYSTURKOMMUNU

Samognarbøur 4, 520 Leirvík – Tel. 730060
Við Gjónna 4, 510 Gøta – Tel. 730070
Teldupostur: sey@skulin.fo
Heimasíða: www.skeyk.fo

Í Skúlanum í Eysturkommunu leggja vit serligan dent á:

- at trivnaðurin er í hásæti
- at tolsemi eyðkennir skúlan
- at næmingarnir mennast og gerast sjálvstøðugir
- at kveikja hugflogið

Skúladagurin

- Skúladagurin byrjar kl. 8.00 og endar í seinasta lagi kl. 14.25.
- Morgunsangur er hvønn morgun kl. 8.00.
- Matarsteðgur er kl. 11.20-11.35.
- Klokkutíðirnar eru hesar:

1.-2. tími	08.00-09.30
3. tími	09.45-10.30
4. tími	10.40-11.35
5. tími	11.50-12.35
6. tími	12.45-13.30
7. tími	13.40-14.25

Skúlin væntar

At næmingarnir

- møta stundisliga
- eru úthvíldir, ikki svangir og hava matpakka við
- eru væl fyrireikaðir
- hava bøkur, amboð og ítróttar/svimjiklæðir við sær
- vísa høviskan og sømiligan atburð ímóti hvørjum øðrum og ímóti lærarunum
- akta boð og forboð, sum skúlin setir

At foreldrini:

- fylgja við tí, sum barnið arbeiðir við, og stuðla tí í sínum arbeiði
- vísa veruligan áhuga fyri barnsins arbeiði og hjálpa næminginum við heimasetninginum í tann mun, tað er neyðugt
- siga frá, um næmingurin ikki hevur tað gott í skúlanum
- tosa við skúlan, um tey halda, at okkurt er, sum ikki er í lagi – **ikki** gjøgnum barnið ella meðan barnið hoyrir
- tosa við starvsfólk skúlans, meðan tey eru til arbeiðis ella eftir avtalu

Skúlin og heimið

- Dagliga samskiftið er við flokslæraran
- Tað er týdningarmikið, at foreldur og avvarðandi virða skúlan sum arbeiðspláss hjá næmingum og lærarum, og at skúlin er ein sjálvsagdur partur í lívi barnsins.
- Verið virkin og vísið eldhug!
- Positiv foreldur – positiv børn. Positiv og glað børn læra best.
- Biðið ikki næmingin frí meira enn neyðugt.
- Vit ganga ikki inni í skóm. Næmingarnir hava hvør sína hyll í durinum at seta skógvarnar á.
- Spyrjið **á røttum stað**, um tit ivast ella undrast á okkurt.
- Í skúlaárinum verður hildin ein kunnandi foreldrafundur við skúlabyrjan og ein ella tvær foreldraviðtalur. Harumframt skipar Skúlastýrið fyri einum árligum felags foreldrafundi.

Heimasetningur

Heimasetningurin verður lagdur á heimasíðu skúlans www.skeyk.fo í seinasta lagi kl. 15 dagin fyri.

Bøkur og amboð

Amboð – sum t.d. blýantar, litblýantar, viskileður, linjál og seinni vinkulmátara og passara – hevur næmingurin sjálvur við sær.

Allar skúlabøkur, sum næmingurin fær frá skúlanum, eru at rokna sum lán.

Heimið hevur ábyrgd av, at pappír verður lagt uttan um bøkurnar, og at tær verða hildnar í góðum standi.

Fartelefonir

Um næmingarnir hava fartelefon við í skúla, skal hon liggja sløkt í skúlataskuni. Brúkar næmingurin telefonina uttan loyvi, verður hon tikin og løgd inn á skrivstovuna. Næmingurin fær telefonina við heim, tá dagurin endar. Endurtekur hetta seg, mugu foreldrini koma eftir telefonini.

Heimasíðan - www.skeyk.fo

Umframt heimasetningin liggur øll kunning, sum viðvíkur skúlanum, á heimasíðuni www.skeyk.fo. Eisini eru myndir frá tiltøkum og útferðum, tíðindagreinar, hent amboð og leinkjur at finna har.

Starvsfólk

Leiðsla	
Atli F. Johansen, skúlastjóri	730070
Birgit Frederiksberg,	730080
Beinta Lervig, skrivari	730080
Lærarar	
Birna Zakarisdóttir Lamhauge	226861
Inger Olsen	267024
Julia Lamhauge	256512
Karin Vatnhamar	226606
Katrin á Lakjuni	584061
Martina B. Poulsen	271277
Rúni Gaardbo	217106
Sædis Eilifsdóttir	229298
Signar á Reynatrøð	258500
Silvurlín Rasmussen	224232
Sonja Hansen	223238
Súni Olsen	223817
Valborg K. Johannesen	589970
Stuðlar	
Súsanna Andreasen	277690
Heidi Sevdal	253810
Húsavørður	
Petru Jákup Heinesen	730093